

**_Ein floksformaður í døpurhuga. Seinasta veljarakanningin gav Javnaðarflokkinum 14 skelkandi prosent, og tað er verri enn vanlukkuliga valið í 1994, tá Javnaðarflokkurin fekk ringasta úrslitið síðani heimastýrislógina. Fremsta avbjóðingin hjá Jóannesi Eidesgaard er nú at fáa eina fíggjarlóg í land, sum ikki gongur teimum økjunum ov nær, ið javnaðarfólkini í landsstýrinum hava raðfest_**

**_Mynd: Jens Kristian Vang_**

ágangin á vælferðarsamfelagið", sum hann málber seg. Ikki minst í eini krepputíð.

– Flokkurin fær einans siðbundnu veljararnar aftur, um hann leggur fram eitt greitt sosialdemokratiskt alternativ til borgarligan politikk. Og pensjónsmálið er uttan samanbering størsta politiska málið í hesum valskeiði, slær Jóannes Dalsgaard fast.

Ein onnur fyrrverandi persónligheit á føroyska vinstravonginum er Øssur Winthereig, sum vit best kenna sum journalist og tíðindaleiðara í Kringvarpinum, men sum eisini hevur verið virkin politikari í Verkamannafylkingini fyrst í nítiárunum. Hann tekur undir við, at grundsjónarmiðini hjá Javnaðarflokkinum eru trupul at hóma í hesum døgum. Men hann metir samstundis, at áleikandi fíggjarkreppan kann styrkja Javnaðarflokkin.

> *– Flokkurin hevur ikki útviklað ein systematiskan, offensivan og greiðan politikk, sum fortelur umheiminum, hvat tað merkir at vera sosialdemokratur í 21. øld*
>
> *Jógvan Mørkøre, stjórnmálafrøðingur*

– Nú er ikki longur forboðið at vilja temja marknaðarkreftirnar ella at siga hart, at tað almenna kann hava ein týðandi leiklut í einum samfelagi. Hetta eigur at kunna styrkja Javnaðarflokkin, metir Øssur Winthereig.

## Lunkað modernisering

Tá Jóannes Dalsgaard tosar um siðbundnu veljararnar, tosar hann um tey, sum einans hava eina fólkapensjón ella eina avlamispensjón. Tey, sum liva av eini verkamannaløn ella eini vánaligari hýru til lívsins uppihald.

Men stóra tvístøðan hjá sosialdemokratisku flokkunum í Norðurlondum hevur verið, at hesin samfelagsbólkurin er vorðin minni, meðan miðalklassin er vorðin størri, so hvørt sum vælferðarsamfelagið er útbygt. Bardagin hjá fakfeløgunum ímóti stættasamfelagnum er ikki eins sjónligt. Og hetta hevur í flestu grannalondunum merkt, at sosialdemokratisku flokkarnir hava dagført sínar floksskráir og lagt seg nærri miðjuni við teirri grundgeving, at samtíðin krevur modernisering í mun til gamla stríðið millum løntakara og arbeiðsgevara. Stóri spurningurin, sum hevur givið sosialdemokratiskum politikarum og ráðgevum grá hár á høvdið, hevur ljóðað soleiðis: Hvussu fær man fatur á nýggja miðalklassanum *uttan* at kuta røturnar til kjarnuveljaran?

Jógvan Mørkøre, stjórnmálafrøðingur, metir, at Jóannes Eidesgaard í fleiri førum hevur signalerað, at hann ynskir at modernisera Javnaðarflokkin. Dømi um hetta eru, tá Jóannes Eidesgaard tónaði niður stættastríðið á landsfundi hjá Javnaðarflokkinum í 2005 við orðunum um, at stríðið fyri sjálvsøgdum rættindum var vunnið. Ella tá hann í fyrru ABC samgongu lanseraði eina visjón 2015, sum gekk uppá tvørs av flokspolitisku mørkunum, og sum lítið hevði við siðbundnan javnaðarpolitikk at gera.

Men trupulleikin hjá Javnaðarflokkinum er sambært Jógvani Mørkøre, at hetta stigið er ikki tikið fult út. Við øðrum orðum er sosialpolitiska programmið vorðið kámari, uttan at nakað er komið í staðin. Og hendan støðan skyldast, at flokkurin ongantíð hevur gjørt upp við seg sjálvan, hvørja leið hann í felag skal ganga.

– Javnaðarflokkurin hevur ikki útviklað ein systematiskan, offensivan og greiðan politikk, sum fortelur umheiminum,

Framhald á næstu síðu